# OPEN CALL

## ÓLAVSØKUFRAMSÝNINGIN 2018

# MÁL

28. JULI
LISTASAVN
FERNISERING

12. AUGUST
FØROYA
28. JULI
KL. 15

## INNLATINGARFREIST FYRI UPPSKOT:
## SUNNUDAGIN 1. JULI 2018

LES MEIR UM FRAMSÝNINGINA OG
VEGLEIÐING FYRI INNLATING AV VERKUM Á SÍÐU 2-5

# -MÁL-

**HEITIÐ Á ÓLAVSØKUFRAMSÝNINGINI 2018 ER:**
**-MÁL-**

Heitið tekur støði í orðastovninum 'mál'. Hendan stavsamansetingin finst í eini ørgrynnu av føroyskum orðum.
Hesi orð nema við m.a.:

**mál, søgu, siðvenju, politikk, list, ítrótt, mat, sosial og menniskjaslig viðurskiftir.**

Hetta talar tí til flest øll økir innan okkara samleika sum tjóð og fólk sum heild.
Hesi evnir eru serliga nógv á breddanum um Ólavsøkumundið, og tí er hetta heitið kosið til Ólavsøkuframsýningina 2018.

Gjørdur er ein listi við uml. 240 orðum við orðastovninum 'mál', og er hann at finna á síðu 3.

Sum nakað heldur øðrvísi, so er heitið í ár ein áheitan til tey vitjandi á framsýningini, og ikki til listafólkini, sum vanligt er.

Samskipari, Jón Sonni Jensen, metir tað vera sera umráandi at listafólkini hava so fríar teymar sum møguligt, og at teirra listarliga arbeiði ikki verður avmarkað av einum ávísum evni, sum møguliga liggur við síðuna av teirra egna praksis.

Tó er frítt hjá listafólkunum at leita sær íblástur í áðurnevnda orðalista.

Av tí at heitið vendir sær til hyggjaran, er ætlanin í ár at gera meira við upplýsingum til tey vitjandi í mun til undanfarin ár.
Umframt at okkurt samvirkið (interaktivt) eisini gerst partur av upplivingini.

'Eg sakni ofta eina sakliga og fakliga kjakmentan í Føroyum, bæði innan list og í tí almenna rúminum sum heild. Vit eru ofta ov friðarlig ella ósaklig. Tí vil eg í ár gera eina framsýning sum eggjar til kjak, samrøðu og sjónligar fríar meiningar.
Eitt tiltak, ið loyvir meiningunum fram at',
sigur samskipari og kurator av framsýningini, Jón Sonni Jensen

Til ber nú at senda uppkot til Ólavsøkuframsýningina 2018. Tað er frítt hjá øllum at senda verk inn, og valt verður síðani úr teimum innsendu uppskotunum. Samskiparin, leitar eftir uppskotum innan allar listagreinar:

**myndlist, installatiónslist, videolist, ljóðlist, framførslulist osfr.**

Tey, ið eru áhugaði at senda inn uppskot, finna eina vegleiðing við nærri upplýsingum og krøvum á síðu 4-5.

# MÁL-LISTIN

PERSÓNSMÁL **ÁHUGAMÁL** DULMÁL **EYGAMÁL** LOYNDARMÁL **HUGMÁL** HJARTAMÁL **LÍVSMÁL** IVAMÁL **VANDAMÁL** MÁLBUNDIN **SKOTMÁL** MÁLLEYSUR **MÁLSETNINGUR** MÁLTIKIN **MÁL** ENDAMÁL **ENDAMÁLSGREIN** AÐALMÁL **ÁLVARSMÁL** EVNISMÁL **SKUNDMÁL** UMMÁL **LEIGUMÁL** MÁLBÓLKUR **MÁLDRÚGVUR** LJÓSMÁLI **MÁLSØGA** FEDRAMÁL **FORNMÁL** UPPRUNAMÁL **NÚTÍÐARMÁL** MÁLÆTT **KVÆÐAMÁL** RIDDARAMÁL **RÚNAMÁL** MÁLAGREIN **BENDINGARMÁL** SERMÁL **MÁLAMÓT** MÁLBERING **MÁLBINDA** MÁLBROYTING **MÁLBURÐUR** MÁLBÚNI **MÁLBÚNING** MÁLBYGNAÐUR **MÁLFELAG** MÁLFORMUR **MÁLFRØÐI** MÁLFØRI **MÁLFØRLEIKI** MÁLFØRSLA **MÁLHUGUR** MÁLISKA **MÁLKENSLA** MÁLKUNNLEIKI **MÁLKÚGAN** MÁLKØN **MÁLMENNING** MÁLMERKI **MÁLNEVND** MÁLNÝTSLA**MÁLREGLA** MÁLREINSING **MÁLRØKT** MÁLRØRSLA **MÁLSKEIVT** MÁLSLINGUR **MÁLSNIÐ** MÁLSNILD **MÁLSPILLA** MÁLSTARV **MÁLSTREV** MÁLSTRÍÐ **MÁLSTØÐA** MÁLSÝNI **MÁLTÁTTUR** MÁLVILLA **MÁLVINUR** MÁLVÍSINDI **SJÁLVSTÝRISMÁL** LÆKNAMÁL **LØGREGLUMÁL** LØGTINGSMÁL **ORKUMÁL** REVSIMÁL **UMHVØRVISMÁL** VINNUMÁL **MENTAMÁL** ALMANNAMÁL **BÚNAÐARMÁL** BÚSKAPARMÁL **LØGMÁL** FERÐSLUMÁL **FISKIVINNUMÁL** FÍGGJARMÁL **STJÓRNARMÁL** HANDILSMÁL **HEILSUMÁL** HERNAÐARMÁL **INNLENDISMÁL** ÚTLENDISMÁL **SAMFELAGSMÁL** UTTANRÍKISMÁL **RÍKISMÁL** SKÚLAMÁL **TINGMÁL** TRÚARMÁL **VERJUMÁL** MÁLPOLITIKKUR **MÁLSØKI** ARVAMÁL **SAKARMÁL** RÆTTARMÁL **SKILNAÐARMÁL** TRÆTUMÁL **MÁLSEVNI** SÁTTMÁLI **MÁLSRÆÐI** MÁLSSKJAL **MÁLSVIÐGERÐ** ÁSTARMÁL **BARNAMÁL** BLAÐMÁL **BÓKAMÁL** MÓÐURMÁL **GERANDISMÁL** BLANDINGSMÁL **KUNNINGARMÁL** LAKMÁL **SKRIFTMÁL** SMÁMÁL **STÓRMÁL** TALUMÁL **TVÍMÁLSLIGUR** MÁLA **MÁLAGANGUR** MÁLAGEIPAN **MÁLAMIKIL** MÁLASKJALDUR **MÁLBLAND** MÁLBLENDINGUR **MÁLDÁMUR** MÁLDRÁTTUR **MÁLFIMI** MÁLGAGN **MÁLKRINGUR** MÁLKYNSTUR **MÁLLJÓÐ** MÁLMIKIL **MÁLMISSUR** MÁLNÆMI **MÁLÓÐUR** MÁLREYSTUR **MÁLRÓMUR** MÁLSKUR **MÁLTÓNI** MÁLVEIKUR **BÓLKAMÁL** FELAGSMÁL **MÁLSAMFELAG** MÁLTELD **MÁLTRÁÐUR** KVINNUMÁL **MÁLKYN** ÓMÁLI **MÁLLOYSINGUR** NORÐANMÁL **SUNNANMÁL** GRANNAMÁL **HAVNARMÁL** BYGDARMÁL **NORÐURLANDAMÁL** HEIMAMÁL **SKYLDMÁL** TJÓÐARMÁL **MÁLØKI** KROPSMÁL **TUNGUMÁL** MÁLBEIN **MÁLOYRA** MÁLTONN **MATMÁL** MÁLTÍÐ **MORGUNMÁLI** DØGURÐAMÁLI **MILLUMMÁLI** NÁTTURÐAMÁLI **DJÓRAMÁL** NEYTAMÁL **REYÐFISKAMÁL** KRÁKUMÁL **SEIÐAMÁL** STEGGJAMÁL **MÁLREVUR** MÁLMBRESSA **MÁLARALIST** MÁLINGARBLIKK **MÁLINGARPENSIL** MÁLNINGAFRAMSÝNING **MÁLNINGALIST** MÁLNINGUR **SJÓVARMÁLI** SUMMARMÁLI **MÁLS** SJÁLVMÁL **MÁLKAST** MÁLSPARK **MÁLLINJA** MÁLVERJI **MÁLMØGULEIKI** MÁLMUNUR **MÁLSØKIN** MÁLTEIGUR **BUMBUMÁL** STRÍÐSMÁL **BRUNAMÁL** VANDAMÁL

# VEGLEIÐING FYRI INNLATING AV VERKUM TIL METINGAR

**HVØR KANN LATA VERK INN TIL METINGAR TIL ÓLAVSØKUFRAMSÝNINGINA 2018?**
Ein og hvør kann lata verk inn til metingar. Bæði einstaklingar sum bólkar eru vælkomin at lata verk inn.
Samskiparin vil eisini sera fegin leggja dent á at ALLAR listagreinar hava áhugað!
(myndlist, installatiónslist, videolist, ljóðlist, framførslulist osfr.)

**NÆR ER UMSÓKNARFREISTIN?**
Innlating av verkum gongur fyri seg umvegis teldupost. Tað vil siga við talgildari skjalprógvan av verkunum.
Hetta skal latast inn í seinasta lagi sunnudagin 1. juli 2018 – kl. 18:00

**SENDAST SKAL TIL HENDAN TELSDUPOSTIN:**
olavsokuframsyning2018@gmail.com

**HVUSSU NÓGV VERK KUNNU LATAST INN?**
Tað ber til at senda so nógv verk inn sum tær lystir, men samskiparin tilskilir sær rættin til sjálvur at velja úr rúgvuni.
Um tú ynskir at tað er alt ella einki, so skal hetta viðmerkjast í teldupostinum.
Fyri hvørt verk skulu í mesta lagi latast inn 4 myndir. Og hesar skulu vísa á heildina, smálutir og ymsir vinklar, har tað hevur týdning av heildarfatanini.
Eitt videoverk ella líknandi verk, kann eisini latast inn sum ein leinkja til heimasíðu ella líknandi. Tó skal skal tað vera heilt greitt hvat verk verður latið inn til metingar.

**HVAT SKAL LATAST INN SAMAN VIÐ VERKUNUM?**
Verkini skulu latast inn umvegis teldupost. Hvørt verk (fíla) skal vera navngivið við navni á listafólki, og nummari.
Umframt hetta skal latast inn:
**1)** Ein ***greiður*** listi við nummari á verki og tilhoyrandi heiti, ár, stødd/longd, nøgd/upplag (til dømis í samband við grafiskt verk, foto osv.), tilfar, prísur, og annars aðrar viðkomandi upplýsingar. Ynskir tú ikki at verkið skal vera til sølu, so skal hetta eisini viðmerkjast við t.d.: 'ikki til sølu', 'egin ogn', 'ogn'.
*GG!* Skjalprógvan/myndir skulu vera av nóg høgari góðsku, soleiðis at samskiparin ikki er í iva, hvussu verkið sær út!
**2)** Ein listi við navni á listafólki, telefonnummar og t-postur.
**3)** Stutt frágreiðing (okkurt um 5-10 linjur) um tankarnar handan verkini.
**4)** Ein stutt lýsing av tær sum listafólk, tína bakgrund (t.d. útbúgving, royndir), og tína praksis. Umbiðið verður um hesa lýsingina, tí møguliga koma hesar at heingja á vegginum í ársins framsýning.

**GG! Tað hevur alstóran týdning at allar upplýsingarnar, sum umbidnar eru omanfyri eru við í innsendingini!**

**NÆR OG HVUSSU FÆR EIN BOÐ UM VERKINI ERU VIÐ Í FRAMSÝNINGINI ELLA IKKI?**
Avgerðin hjá kuratori verður send út umvegis t-posti, sum er nevndur á listanum, sum verður sendur við verkunum.
Umsóknarfreistin er mikudagin 1. juli 2018, kl. 18:00, og svar verður sent út 2-4 dagar eftir freist.

**UM EITT VERK VERÐUR VIÐ Á FRAMSÝNINGINI, HVØR STENDUR SO FYRI UPPHEINGJAN OG LÍKNANDI?**
Kuratorurin av Ólavsøkuframsýningini stendur fyri hesum, og tekur sær fullan rætt til at skipa yvir framsýningini og hvussu verk verða hongd upp.

**HVUSSU ER VIÐ TEKNISKARI ÚTGERÐ?**
Listafólk ið lata verk inn, sum krevja tekniska útgerð (uppvørpu, skerm, ljóðanlegg osfr.), hava sjálvi ábyrgdina av hesum, og skal tilhoyrandi tekniska útgerðin latast inn saman við verkunum. Umframt útgerðini, skal ein ***greið*** frágreiðing yvir hvussu tendrað og sløkt verður eisini fyriliggja. Hetta er til starvsfólk á listasavninum, sum taka sær av hesum meðan framsýningin er.
Set teg í samband við kuratorin frammanundan umsóknarfreistina um neyðugt.

**NÆR OG HVAR SKULU ÚTVALD VERK LATAST INN?**
Um tíni verk eru útvald til Ólavsøkuframsýningina 2018 skal hetta latast inn á Listasavni Føroya mánadagin 23. juli 2018.
Listafólkið stendur sjálvt fyri flutningi av verkunum, bæði til og frá Listasavni Føroya.
Verkini eru tryggjaði meðan tey verða sýnd fram á Listasavni Føroya frá 28. juli til og við 12. august 2018.

**UM EITT VERK VERÐUR SELT?**
Verður eitt verk selt, verður 25% av prísinum á verkinum latin til Listafelag Føroya. Tískil skal hetta vera íroknað prísinum, sum stendur á listanum, sum verður latin inn við verkunum.
Peningurin verður útgoldin, tá ið keypari hevur goldið alla upphæddina til Listafelag Føroya.

ØLL VERK SUM IKKI VERÐA SELD, SKULU AVHEINTAST Á LISTASAVNI FØROYA, TÁ IÐ FRAMSÝNINGIN LETUR AFTUR, Í SEINASTA LAGI: MÁNADAGIN 13. AUGUST 2018 - Kl. 12:00 !

Um tú hevur nakrar spurningar viðvíkjandi Ólavsøkuframsýningini 2018, ert tú vælkomin at seta teg í samband við fyriskiparan umvegis teldupost, olavsokuframsyning2018@gmail.com, ella við at ringja á tlf. 589586

Vinarliga

Kurator og samskipari av Ólavsøkuframsýningini 2018
Jón Sonni Jensen

@

OLAVSOKUFRAMSYNING2018@GMAIL.COM

ÓLAVSØKUFRAMSÝNINGIN 2018

#MÁL2018